## DAGSINS MEINING

# Meira enn eitt formansval 2

Undir yvirskriftini ”Meira enn eitt formansval” gjørdu vit okkara metingar á hesum stað undan valinum í Sambandsflokkinum. Har róðu vit framundir, at her var ikki bert talan um, hvør skuldi vera formaður Sambandsfloksins komandi árini, men at hetta hevði eisini nakað at gera við hvønn politikk og hvørjar samgongur partar av Sambandsflokkinum helst ynskja í framtíðini. Eisini skrivaðu vit, at ávísir partar av flokkinum eru ikki bert ónøgdir við Kai Leo Johannesen sum formann men eru eisini ónøgdir við at vera í samgongu saman við Javnaðarflokkinum og Fólkaflokkinum. At hesir partar av flokkinum vilja hava broyting ikki bert í innanhýsis politikkinum men eisini í vali av samgonguflokkum. Víst varð á, at somu partar av flokkinum, tó at teir ikki eru í meiriluta, vilja helst ikki samstarva við Fólkaflokkin orsakað av hansara búskaparpolitikki og ikki við Javnaðarflokkin eitt nú orsakað av leiðsluni í flokkinum.

Hetta var okkara analysa og hevur tíðin eftir formansvalið eisini víst, at ikki einki var um hetta. Johan Dahl hevur alment sagt frá, at honum hevði dámt best eitt samstarv við Tjóðveldisflokkin. So er tað komið uppá pláss.

Út frá hesum ber í dag til at siga, at afturvalið av Kai Leo Johannesen til formann er eisini ein sigur fyri verandi samgongusamstarv tó at tað ikki givið er nøkur trygd fyri, hvussu verður eftir næsta val. So ein kann siga, at valúrslitið var eisini ein sigur fyri samgonguna og her ikki minst løgmann, ið sum vituligt er, ikki júst er í krithúsinum hjá Johan Dahl ella hansara stuðlum í tingbólkinum.

Vit kunnu tí bara ímynda okkum tær broytingar, sum høvdu komið í kjalarvørrinum á einum Johan Dahl sum formanni. Tá hevði hansara vongur verið styrktur og harvið eisini ynskini um at førka seg frá Fólkaflokki og Javnaðarflokki og móti Tjóðveldisflokkinum ístaðin. Tí við einum Johan Dahl sum formanni í Sambandsflokkinum eftir eitt komandi val, har Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin høvdu fingið meiriluta einsamallir ella stuðlaðir av einum minni flokki, tá hevði Tjóðveldisflokkurin fyri at koma inn í hitan aftur sjálvandi latið Johan Dahl løgmanssessin. Soleiðis gita vit, at Johan Dahl og hansara stuðlar eitt nú í tingbólkinum høvdu ætlað at spæla kortini. Men hesaferð gekk kabalan so ikki upp. Hóast avbjóðarin gjørdi ein stóran innsats og eisini gjørdi ein góðan figur í miðlunum undan valinum við at vísa á tað, sum mong eisini eru samd við honum í, nevniliga at verandi formaður hevur ikki tann neyðuga profilin til at føra flokkin fram, so miseydnaðist spælið. Har vóru ikki nokk av trumfum, tá avtornaði.

Tað er eisini vert at seta spurningin í hesum sambandi, hvør leikluturin hjá fyrrverandi formanninum og verandi tingformanni, Edmundi Joensen, verður í flokkinum í framtíðini. Tí tað er eingin loyna, at hann hevur stuðlað Johan Dahl, og tað er ein ærlig støða. Men her var Johan Dahl so taparin, og spurningurin verður so, um tað vera aðrir taparar í Sambandsflokkinum í framtíðini eisini eftir hetta. Hvussu enn verður eftir komandi val so kann verandi løgmaður sanna orðatakið ”so far so good” og fegnast um, at tað ikki bleiv eitt leiðaraskifti í Sambandsflokkinum, tí tað hevði kunnað skundað undir eina heilt nýggja samgongu eftir valið. Tann møguleikin stendur tó framvegis opin, og hvør veit, um ikki tað eru kreftir í Sambandsflokkinum, sum ynskja løgmanssessin aftur – um so tað verður saman við Tjóðveldinum ella kanska netttup tað. Og nú tá formansval er so ”populert” í Sambandsflokkinum, hvør veit, um tað ikki verður ein heilt annar, sum stendur klárur at taka við bæði formans- og løgmanssessi eftir komandi val!.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# EFTA-bátur ella eftirbátur?

**HERI SIMONSEN**



Um føroyingar gerast limir í ES mugu teir gevast við grindadrápi og fuglaveiðu. Øll hvala- og villfuglaveiða er strangliga bannað í ES.

Um føroyingar gerast limir í EFTA sleppa teir at halda fram við grindadrápi, og Kaj Leo sleppur framvegis til Mykinesar at veiða fugl!

Um føroyingar gerast limir í ES avreiða teir alla sína fiskivinnu til Bruxelles!

Um føroyingar gerast limir í EFTA verður fiskivinnan verandi á føroyskum hondum.

Ein skotskur fiskimaður úr Peterhead fortaldi mær, at 98% av allari botnfiskakvotuni í Skottlandi fer til onnur ES-lond. Skotar sjálvir fáa bara 2% av botnfiskakvotuni í skotskum sjógvi. Vilja vit tað sama skal henda okkum í Føroyum? Hvat nyttar ein stórur marknaður, tá aðrir taka fiskiríkidømið?

Kaj Leo nevnir EFTA fyri ”4. deild”, men Sveis og Noreg eru so ríkastu lond í Evropa. Liktinstein er eitt múgvandi pinkuland, og Ísland klárar seg væl betri enn Den Danske Bank vil verða við. Vit minnast væl øll oktober-kollveltingina hjá Den Danske Bank í 1992?

So heldur ein EFTA-bátur, sum leggur frá Kaj, enn ein eftirbátur í tungum ES-sjógvi. Tað er betur at verða 5 sum skilja hvønn annan, enn 25 sum misskilja hvønn annan. Annars var vallutøkan til síðsta ES-parlamentsval bara góð 37%. Tað sigur ikki einki, at 2/3 sótu heima, og føldu hetta valið verða óviðkomandi. Og nú fer ES-dómstólurin at banna brøðrafólki okkara í Álandi at veiða fugl (tann sonevnda: ”vårfågeljakten”í mai/juni), og at snúsa! Hygg og tygg uppá tað!

# Ein avvápnaður sambandsflokkur

**PETUR S. JOHANNESSEN**
Vágur

Nú hendi tað aftur, tað sum Sambandsflokkurin er vorin so kendur fyri í seinastuni, nevniliga at Johan Dahl fekk enn einaferð knívin í ryggin av sínum partamonnum, hetta sigur ikki lítið um hesi fólk, sum standa á odda fyri sambandsflokkin og teirra lokalfeløg, vónandi gloyma sambandsveljarir ikki hesa svínagerð við næsta val.

Eftir at hava fingið vátta 38 av teimum 52 stemmunum, avgjørdi Johan Dahl at stilla upp til formansvalið í Sambandsflokkinum, Norðoya Sambandsfelag við teirra formanni á odda gjørdi ímóti tí, teir hava játta, saman við fleiri øðrum lokalfeløgum, løgtings og landsstýrismonnum, at Marjun Olsen búsitandi á Tvøroyri ikki atkvøddi fyri Johan Dahl vistu vit av, tí hon hevur sagt at hon ikki dámdi Johan Dahl, men at hini fólkini ikki komu út úr skápinum beinanvegin, er ein stórur trupulleiki fyri Sambandsflokkin, hetta má ikki gerast ein vani, at dólka tey fólkini, sum hava áraðið og dirvið til at veruliga at fáa litt flokkin uppá ovastu rók, eg yvist í at vinnulívsfólk og fólk sum vilja framburð, fara inní eitt slíkt forum, sum Sambandsflokkurin er vorin til.

Løgmaður man í hesum døgum smílast og hugsa um tað væleydnaðu samansvørjingina hann og suðurstreymoyar sambandsfelag og tess løgtingsumboð, saman við Norðoya Sambandsfelag gott stuðlaðir av Eysturoyar sambandsfelag og øðrum, gjørdu í móti Johan Dahl, nevniliga at fella hann sum fiskimálaráðharra, og eingin umbering kom frá løgmanni ella fregnir ( teirra bakmonnum) eftir at tað vísti seg at Johan var fríkendur frá øllum ákarum, her vil eg vísa til egnu grein um tað mundi, undir heitinum ” Inger Krause Jensen – Syrgjandi einkja ella ? tann 01 – mars – 2004” her verður víst á at alt, sum er komið fram í fregnur um Johan Dahl og Inger Krause Jensen er púrasta burturvið, men løgmaður saman við judasunum í Sambandsflokkinum avhøvdaði Johan Dahl, tí hann var ein persónligheit, sum seinni kundi profilerða seg sterkt, og harvið kundi hann verða ein trupulleiki/hóttan, sum mátti loysast her og nú.

Vónandi kunnu teir veljarar, sum hava staði saman um Johan Dahl, fáa eygini upp fyri hesum heykum, sum herja Sambandsflokkin, og sum eru í fer við at seta teirra fólk í leiðandi størv í flokkinum, og harvið gerða flokkin totalt litleysan.

Eitt er givið at sambandsfelagið í Suðuroynni eftir at eini 4 fólk hava trekt seg úr felagnum, er eitt felag sum Marjun Olsen verður formaður fyri, og hon má metast at verða sturd totalt av formanninum í sambandsflokkinum, og harvið verður Suðuroyar Sambandsfelag ikki nakað forum og miðpunkt framyvir, hjá teimum veljarum ,sum hava stuðla Johan Dahl.

Hvat nú fer at henda er ikki til at siga, men at lata tinsoldatarnar hjá leiðsluni í Sambandsflokkinum fáa frítt spæl í Suðuroy er ikki heppið, og ikki oynni til gagns, so spennandi tað verður tað.

# Alment roykibann við flogvøllin

**VICTOR CARLSEN**

Ein sannroynd er, at í fleiri ár hevur tað nú verið roykibann fyri tey ferðandi á mongum almennum økjum, so sum Bygdaleiðum, Strandferðsluni, Farstøðini í Havn, taxabilum, flogførunum, og nú seinast vórðu Hotel Vágar og Hotel Føroyar eisini gjørd roykfrí.

Skilji tí ikki rættuliga, at vit ikki enn hava fingið alment roykibann í far- og komuhøllini við flogvøllin í Vágum. Verandi skipan við avmarkaðum opnum plássi er láturlig og púra ónýtilig.

Hetta er so ein áheitan á flogvallaleiðsluna um at fáa samsvar í og at gera nakað ítøkiligt á hesum øki.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.